# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/03 - 4. mars 2021 16:00-18:00

### Skrá:

1. 1.flokkur komandi skúlaár
2. Royndarverkætlanir
3. Næsti fundur ásettur

### Møtt á fundi:

Møtt: Regin, Ruth, Bjørg, Sjúrður, Derhard, Erla & Snorri
Forfall: Eingin

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**1.flokkur komandi skúlaár**
Skúlastýrið hevur viðgjnørt málið um 3 ella 4 flokkar í komandi 1.fl.
Skúlastýrið góðtekur avgerðina hjá býráðnum um at 4 flokkar byrja í 1. flokki undir tí treyt, at talan verður um eindømi. Skúlastýrið heitir á kommununa um at bera so í bandi, at avleiðingarnar av hesi avgerð verða so avmarkaðar sum møguligt.
Tí heitir skúlastýrið á kommununa um at veita skúlanum fyribilshøli ella bingjur beint við skúlan til hendan 1. flokkin, ið er komin inn eyka, at húsast í.
Harumframt heitir skúlastýrið á kommununa um at taka avbjóðingarnar við trongu kørmunum hjá frítíðarskúlanum í størri álvara og hugsa eina loysn fyri hølistrupulleikarnar hjá frítíðarskúlanum saman við eini loysn til 1.fl.
Skúlastýrið mælir til at hóskandi nógvir skúrar verða settir á mattrikkul 917 og at atkomuviðurskifti millum skúlan og skúrarnar verða gjørd trygg og høglig. Ella at kommunan útvegar fyribilshølini hjá SEV, ið standa beint við skúlan.
Skúlastýrið ynskir eisini at kommmunan skjótast gjørligt avgreiðir avleidd ivamál av avgerðini um 4 flokkar í 1. Flokki komandi skúlaár. Herundir eyka flokk í 8.flokki, serflokk og eykaútreiðslur til manglandi innbúgv.

Ad.2
**Royndarverkætlanir**
Skúlastýrið hevur viðgjørt tær 7 umsóknirnar um royndar og menningarviksemi komandi skúlár og tekur undir við teimum øllum.

Umsókn um framhald av **fjarlestri**, ið skúlastýrið tekur undir við og eggjar skúlanum til at halda framvið
Umsókn um framhald av **rásaskipan**, heundir c-stig í støddfrøði, ið skúlastýrið er errið av. Skúlastýrið mælir til, at henda skipan verður sett í verk sum varandi, tí hon hevur víst sítt virði í verki.

Umsókn um framhald av **orðblindavinarligum skúla**, ið skúlastýrið tekur undir við. Stuðulin til tey, ið hava avbjóðingar við at lesa er av stórum týdningi. Tey orðblindu og lesiveiku eiga at verða náttúrligur partur av skúlanum og at kunna fylgja við í undirvísingini uttan forðingar.
Umsókn um at **stovna verkætlan við serflokki**, ið skúlastýrið tekur undir við. Skúlastýrið heitir samstundis á kommununa í hesum málinum um at fáa til vega neyðug høli til aðrar verkætlanir, ið kunnu ávirka hesa umsóknina. Umsóknin er treytað av hølum.
Umsókn um at **stovna verkætlan um skúlanoktan**, ið skúlastýrið tekur undir við. Neyðugt er at fáa til vega hagtøl og mannagongdir fyri børn við skúlanoktan. Bæði tey, ið eru komin har til, at tey ikki megna at koma í skúla og tey sum kundu hugsast at farið at komið har til.
Umsókn um fíggjarligan stuðul at fáa fólk uttanífrá at læra okkara starvsfólk í 4-10 tilboðnum eitt nýtt amboð innan **rolluspøl**, ið skúlastýrið viðmælir.
Umsókn um verkætlan, har **skúlin og frítíðarskúlin skulu í samstarv** um mannagongdir og samskipan av tilboðunum, so tey í størri mun kennast sum eitt; ið skúlastýrið tekur undir við. Skúlastýrið staðfestir at neyðugt er við tillagingum millum skúla og frítíðarskúla. Hetta má byggja á eitt tættari samstarv og tíð til fyrireiking saman. Henda umsóknin er treytað av at kommunan játtar tilsvarandi til frítíðarskúlan.

Ad.3
**Næsti fundur**
Næstu fundur er ásettur til 22/4 kl 16:00-18:00